


## Hjartað bankar fyri Arsenal

Thierry Henry spælur fyri Barcelona, men hjarta hansara liggur hjá Arsenal, og ein dag vendur hann aftur til felagið. Franski áloyparin, Thierry Henry, hevur møguliga skift Arsenal-troyggjuna út við eina Barcelona-troyggju, men hjartað brennir enn fyri London-felagnum. Og onkran dagin kemur hann aftur, proklamerar hann sambært The Daily Telegraph. - At spæla fyri Arsenal í átta ár, vinna og tapa á Highbury, gleðina og sorgina, alt var simpulthen fantastiskt. Eg eri stoltur av at hava spælt fyri Arsenal og vera ein fjeppari. Fyrr stuðlaði eg ikki nøkrum felagi, men í dag eri eg Arsenal fjeppari, og tað er ringt, ikki at fylgja við í gongdini í hvørjum dysti. - Man kemur ofta aftur til tað staðið, har man hoyrurr heima. Tí vóni eg at eg sleppi at arbeiða fyri felagið aftur, onkran dag. Tann 30-ára gamli áloyparin ásannar tó at um hann eventuelt kemur aftur, verður tað nokk ikki sum aktivur fótbóltsspælari.






# Serstøk George Best-pub í Slovenia

**FÓTBÓLTUR**
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Náttúruvakrasta staðið í Slovenia er Bled. Tá føroyski landsliðið á sinni leikti útidystin ímóti Slovenia búðu teir á hesum náttúruvakra staðnum. Føroyar taptu tá 0-3. Sjálvur býurin hevur uml. 10.000 áskoðarar. Føroyska talvlandsliðið hevur eisini verið í Bled. Fyri stuttum var altjóða fótbóltsserfrøðingurin hjá Miðlahúsinum, Ivan Eginson í Slovenia. Hann og vinmennirnir fóru ein túr til Bled. Har komu teir fram á eina serstaka George Best-pub. Eigarin av pubbini er úr Norður-Írlandi. Eigarin var tíverri ikki heima, so hann fingu teir ikki heilsa uppá. Men Ivan og vinmennirnir fóru kortini innar. Og tað vísti seg, at øll pubbin var skrýdd við George Best-tekningum og málningum, umframt tekningum av norðurírska landsliðnum, sum teirra trúgvu viðhaldsfólk nevna: "Norn-Iron". George Best livdi frá 1946 og til 2005. Hann varð valdur triðjibesti fótbóltsleikari í 20. øld av altjóða fótbóltsserfrøðingum. Men hann fór illa við sær sjálvum, og sínum nærmastu, og at enda segði livurin stopp! George Best varð valdur Ársins Leikari í Evropa, í 1968. Sama árið vann hann evropeiska meistaraheitið fyri lið saman við liði sínum, Manchester United. Á stuttligu myndunum sæst Ivan Moskalenko uttanfyri pubbina, og eisini innanfyri.